# Verji varandi virði





**Skótalega við luttøku úr Føroyum, Danmark og Íslandi er í hesum døgum við Leynavatn. Legan varð sett týskvøldið og endar sunnukvøldið**

SKÓTALEGA
*Edvard Joensen*

**Við Leynavatn:** Skótin er náttúrumenniskja, og náttúran er varandi virði. Tí vil skótin verja náttúruna.

Undir heitinum »Verji varandi virði« skipar Skótalið Sigmunds Brestissonar í Havn fyri skótalegu við Leynavatn. Luttakarar eru gulir skótar úr Føroyum, skótar úr Íslandi, danskir skótar og eisini grønir, føroyskir skótar. Ein samansett lega, har eisini kann væntast, at hugflogið fer at sveima. Skótalið Sigmunds Brestissonar hoyrir til gulu skótarnar í Føroyum.

Legan verður hildin í samband við, at skótaliðið SSB, sum gula skótaliðið í Havn vanliga verður nevnt, fylti 75 ár í februar í ár.

Samstundis eru liðin 25 ár síðan ta fyrstu stóru skótaleguna við Leynavatn. Tað var tann minniliga legan í 1976, tá alt flotnaði út í áarførinum, sum var. Hvussu var og ikki, so gjørdist tað eitt upplivilsi, sum tey, sum við vóru, ongantíð gloyma aftur. Verri var tað ikki enn so.

Hendan legan, sum nú veðrur hildin við Leynavatn, er triðja legan, SSB skipar fyri her. Tann fyrsta var tann áðurnevnda váta legan í 1976. So var ein aftur 10 ár seinni í 1986, og síðan hendan, sum nú er.

Men tað merkir ikki, at ikki eisini aðrar legur hava verið hildnar. Treyðugt so.

## Leguøkið

Komi koyrandi fram móti Mjáuvøtnum. Siti og hugsi um, hvussu man síggja út við Leynavatn í dag. So mikið er útliðið, at teir fyrstu laksarnir eiga helst at vera komnir niðan. Ella í hvussu er vera á veg.

Man nakar tráðumaður vera har í dag? Og man tað nytta nakað petti, um so er, við øllum teimum skótunum, sum har búleikast. Teir arbeiða og spæla. Gera gang, so einki gerst við nakran fiskiskap kortini.

Sneiði av, áðrenn komið er til tunnilsmunnan, og koyri oman móti vatninum. Her sær deydligt út. Havi eg misskilt okkurt ella hvussu? Her skuldi jú verið fult av lívið, men einki sæst enn uttan gamla, brenda skótahúsið við sandin.

Men so kemur legan undan. Hon er flutt longri fram móti Gjónni, síggi eg. Grundina fái eg at vita, tá eg komi fram til leguna.

Við teirri vátu 1976 leguni í mentu, verður hildið, at ikki er skilagott at halda til har niðri, sum legan tá var. Hægri hon liggur, turrari skuldi verið.

Jú, hugsi eg, meðan eg koyri eftir sandinum. Økið fæst ikki betri til eina skótalegu. Her er náttúran av sonnum vøkur, og virðini eru eisini varandi, sum tey so satt hava víst á.

Og fyri líkasum at undirstrika meiningina í hesi yvirskriftini, stendur skótahúsið, sum teir sjálvir - ella undangongufólkini - hava bygt, og sær út sum eitt, sum átti at verið tikið burtur. Har er einki virði eftir, meðan fjøllini, hagin, vatnið og alt økið rundan um sanniliga eru varandi virði.

## Legan

Jú, tað líkist eini rættiligari skótalegu. Við inngongdina er gjørt eitt portur av viðabulum nog togverki. Tjøldini eru skipað í bólkar, har víst verður á korti, hvar hvør heldur til.

Vanlig tjøld. Hálvar indianarabygdir. Og so eitt tjald, sum heilt skarar burturúr. Eitt stórt monstrum bygt upp av timbri og klætt við svørtum plastikki av sama slagi sum rusksekkirnir, vit vanliga keypa í rullum í handlinum.

Uttan fyri sita grannarnir hjá blaðhúsinum á Argjum. Grønu skótarnir á Argjum eru meistarar fyri hesum ótraditionella tjaldinum, sum innan er bæði fjálgt og hugnaligt. Gott pláss, sum vera man, og so sanniliga eisini skildrað sundur, so fleiri rúm eru inni. Teir eru ikki heilt uttan hugskot har úti.

Eitt stórt tjald stendur oman móti ánni. Har skal skaffast, so tað skal nógv pláss til. Roknað verður við, at við øllum, skótum, leiðarum og hjálparfólkum, verða umleið 200 fólk á leguni hesar dagarnar.

Og tey fáa eisini ivaleyst at síggja til, tí tilboðini eru nógv. Tey vanligu sjálvandi, sum plaga at vera á slíkum legum. Gongutúrar, heik, ymsir aktivitetir á sjálvari leguni, og hvat nú er at nevna.

Men so eru eisini tvey onnur tiltøk, sum kanska ikki eru so vanlig.

Annað er, at siglt verður við seglum á Kollafirði. Bátarnir, brúktir verða til tað, eru føroyskir bátar, sum eitt nú Greipur, sum nógv fólk kenna.

Og niðri við ánna, Kvíviksmegin, stendur ein stórur vognur. Ein »trailari«, sum er opin øðrumegin. Jú, tað er rætt. Hann skal brúkast til konsertpall. Tað verður nevniliga popkonsert við Leynavatn hóskvøldið.

So sig ikki, at ikki eisini nýggj virði koma til skótarnar, sum í ár hava legu við Leynavatn, har dentur annars verður lagdur á at verja varandi virði.







# Nýtt sambýlið til minnisveik í Havn

**Nú hevur Tórshavnar Býráð gjørt av, at nýtt eldrasambýlið í Havn skal byggjast. Sambýlið, sum skal liggja við Vallalíð og Torfinsgøtu, skal hýsa minnisveikum, og er tað fyrsta av sínum slag í Føroyum**

ELDRASAMBÝLIÐ
*Heini í Skorini*



*Økið, har nýggja sambýlið fyri minnisveik skal byggjast, er við Torfinsgøtu og Vallalíð í Havn, og er tað umleið 4100 fermetrar til støddar*

Eftir at tørvur hevur verið á eldrasambýlum í Tórshavn í longri tíð, fer Tórshavnar Kommuna í næstum at taka stig til, at nýtt eldrasambýlið verður bygt. Sambýlið er roknað til minnisveik, og øki, ið bygt verður á, er við Torfinsgøtu og Vallalíð í Havn.

Tað er Sjálvsognarstovnurin Eldrasambýlið undir Tórshavnar Kommunu, sum við hesum bjóðar út arbeiði at byggja sambýlið fyri minnisveik í Havn. Tilboðini frá arkitektum skulu vera inni í seinasta lagi 1. november 2001, og ætlanin er, at byggingin skal kunna byrja skjótast gjørligt.

Bygningurin skal byggjast til 16 búfólk, og skal sambýlið vera í tveimum sjálvstøðugum eindum. Sostatt skal hvør eindin hýsa átta fólkum, og ætlanin er eisini at gera sjálvstøðug felagsrúm til búfólkini á sambýlinum.

## Fyrsta av sínum slag

Beate L. Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd Býráðsins, sigur, at tað hevur verið ómetaligur tørvur á slíkum sambýlum í longri tíð.

Eldrasambýlið, sum í næstum skal byggjast, er ætlað minnisveikum, og er tað fyrsta av sínum slag í Føroyum.

Beate Samuelsen sigur, at nýggi bygningurin verður ikki bygdur sum eitt vanligt eldrasambýlið, tí minnisveik hava serligan tørv framum onnur gomul fólk á vanligum eldrasambýlum. Tí verður tað bygt á ein serligan og øðrvísi hátt, soleiðis at tað hóskar minnisveikum so gott sum gjørligt. Hetta eldrasambýlið verður sostatt fyrsta av sínum slag í Føroyum, tí einki er bygt frammanundan, sum serliga er ætlað minnisveikum.

Økið, har bygt verður á, er í Vallalíð og Torfinsgøtu í Havn, og er tað umleið 4100 fermetrar til víddar. Til- og frákoyringar eru frá Vallalíð.

Tilboðini til byggingina til nýtt eldrasambýlið fyri minnisveik við Vallalíð og Torfinsgøtu í Havn skulu vera inni í seinasta lagi 1. november 2001, og um alt gongur sum ætlað, skal sambýlið vera liðugt og klárt til nýtslu um árskiftið 2002/2003.



*Hans Petur í Brekkunum er ein av tónleikarunum í nýggja bólkinum 12 Funky Monkies, sum spælir í Kagganum fríggjakvøldið*

# Nýggjur tónleikabólkur í Kagganum fríggjakvøldið

**12 Funky Monkies er nýggjur tónleikabólkur við fleiri royndum kreftum, og er hann mannaður av heili tólv tónleikarum. Fríggjakvøldið verður høvi at hoyra nýggja bólkin í Kagganum**

TÓNLEIKUR
*Heini í Skorini*

Fríggjakvøldið verður høvi at hoyra nýggjan tónleikabólk mannaðan av heili tólv tónleikarum í Kagganum. Talan er um bólkin 12 Funky Monkies, sum eisini var at hoyra í Sandagerði til Free Føroyar tiltakið seinasta leygarkvøld, og tá var bólkurin væl dámdur millum áhoyrararnar.

12 Funky Monkies fer at spæla sprellutan dansitónleik, og hava tónleikararnir lagt seg eftir at spæla amerikanskan tónleik við støði í funkstílinum. Stórbandið fer tó eisini at spæla discofunk-tónleik hjá so navnframum bólkum sum Tower of Power og Dr. John. Sostatt er hetta eitt gott høvið hjá fólki, sum dáma at útfolda seg á dansigólvinum.

## Royndir tónleikarar

Bólkurin er mannaður við heili tólv tónleikarum, og fleiri teirra kenna vit frá øðrum bólkum eisini. Fleiri búgva í Føroyum, meðan aðrir eru útisetar í Danmark, Íslandi og heilt til Argentina í Suðuramerika.

Teir tólv tónleikarar í bólkinum eru Niclas Thorsteinsson (forsangari), Katrin Bech, Ingun Joensen og Anna Maria Olsen (sang), Mass Hoydal, Hans Petur í Brekkunum, og Mortan Zachariassen (saxofon), Tróndur Enni (trompet), Dánjal á Neystabø (keyboard), Rógvi á Rógvu (trummur), Hans P. Tórgarð ( guitar), og Bjarki Meitil (bass).

Ímillum hesi nøvn eru óivað fleiri, sum eru at kenna aðrastaðni í føroyska tónleikaheiminum, og talan er sostatt um royndar tónleikarar, sum nú royna seg í nýggjum høpi.

12 Funky Monkies spælir til dans komandi fríggjakvøld í Kagganum í Tórshavn.